VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 16 stig, men har mjørki legst um 10 stig.



Veðrið leygardagin:
Fleyr til gul av landsynningi, um kvøldið frískar hann vindin upp í stívt andøvsgul. Yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið regn ella mjørki. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið sunnudagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og regn ella mjørki eitt skifti, seinnapartin minni vindur av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin gul til stívt andøvsgul av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Týsdagin hækkar hann upp í útnyrðing og ælingur. Hitin millum 8 og 12 stig.

Hugna um Vágsbotn

- Hvussu vit ítøkiliga gera tað, verður støða tikin til, tá arbeiðið við nýggju útsølustøðunum til fugl og fisk er liðugt. Men ætlanin er, at Vágsbotnur skal vera eitt hugnaligt umhvørvi, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri

HAVNAHUGNI
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

- Tað tók sína tíð áðrenn ferð kom á, men nú heldur tíðarætlanin.

Tað sigur Heðin Mortensen, tá Sosialurin spyr hann um, hvussu tað gongst við arbeiðinum at gera nýggj útsølustøð til fugl og fisk í Vágsbotni.

- Í løtuni eru teir í ferð við at leggja flisar á, og arbeiðið verður liðugt fyrsta dagin, sigur Heðin Mortensen.

Hann sigur, at býráðið hevur ætlanir um at hugna um í Vágsbotni.

- Vit fara at seta fleiri benkur upp við standmyndina av Nólsoyar Páll. Kanska verða borð eisini sett upp har, og onkur hevur nevnt møguleikan at seta upp tjald til smáar sølubúðir. Men tað verður tikin nærri støða til tað, tá arbeiðið við útsølustøðunum til fugl og fisk verður liðugt, sigur borgarstjórin.

Hann nevnir eisini, at tað kundi verið sera hugnaligt at skipa fyri harmonikutónleiki á økinum, men tað verður eisini tikin nærri støða til hetta seinni.

Í hvussu er er ætlanin, at Vágsbotnur skal verða eitt stað, har fólk koma at hugna sær.

Arbeiðið í Vágsbotni gongur eftir tíðarætlanini, og verður liðugt um hálvan juni
Mynd: Jens Kristian Vang

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	6
Nuuk	6
Qaqortoq	6
Ammassalik	9
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	14
Seyðisfjørður	6
Tórshavn	10
Lerwick	11
Aberdeen	13
London	15
Tromsø	--
Bergen	23
Oslo	--
Stokkhólm	21
Keypmannah.	21
Helsinki	16
Moskva	12
Berlin	29
Warzawa	26
Kiev	20
Bukarest	22
Paris	17
Madrid	22
Róm	24
Malorca	23
Athen	25
Malta	24
Tunis	25
Beijing	24
New Dehli	35
Bangkok	32
Jakarta	32
Sydney	17
New York	28
Miami	30
Los Angeles	17
Meksikobýur	24
Panama	29
La Paz	13
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	15

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 996 hPa. í útsynning úr Íslandi stendur mestsum í stað og grynnist. Brúgvalagið til Føroya fer eystureftir.



Í dag:
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer vestureftir. Brúgvalgið við Føroyar stendur mestsum í stað

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 03/06 kl. 06⁰⁰ – 04/06 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,7°
Minsti hiti máldur í juni: -9,9° - Mesti hiti máldur í juni: 18,3°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 03/06 kl. 06⁰⁰ – 04/06 06⁰⁰.
Avfallið higartil í juni: 15 mm

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

VESTFALLSKYRRINDI

3. juni Tendring / Mánin næstur jørðini
10.juni Fyrra kvarter

Kelda: Almanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/ Vágafirði fp.	Suðuroyar-/ Vágafirði sp.	Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp.	Hestfirði/ Sundalagnum fp.	Hestfirði/ Sundalagnum sp.	Vestmanna-sundi fp.	Vestmanna-sundi sp.	Mykines-firði fp.	Mykines-firði sp.	Nólsoyar-firði fp.	Nólsoyar-firði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp.	Hvanna-sundi fp.	Hvanna-sundi sp.	Fugloyar-firði fp.	Fugloyar-firði sp.
5. juni	8:39	21:11	7:39	20:11	7:54	20:26	10:39	23:11	11:39	-	6:54	19:26	5:54	18:26	8:54	21:26	9:54	22:26	8:24	20:56	9:39	22:11
6. juni	9:41	22:11	8:41	21:11	8:56	21:26	11:41	-	0:11	12:41	7:56	20:26	6:56	19:26	9:56	22:26	10:56	23:26	9:26	21:56	10:41	23:11
7. juni	10:38	23:05	9:38	22:05	9:53	22:20	0:11	12:38	1:11	13:38	8:53	21:20	7:53	20:20	10:53	23:20	11:53	-	10:23	22:50	11:38	-
8. juni	11:29	23:54	10:29	22:54	10:44	23:09	1:05	13:29	2:05	14:29	9:44	22:09	8:44	21:09	11:44	-	0:20	12:44	11:14	23:39	0:05	12:29
9. juni	-	12:16	11:16	23:38	11:31	23:53	1:54	14:16	2:54	15:16	10:31	22:53	9:31	21:53	0:09	12:31	1:09	13:31	-	12:01	0:54	13:16